Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Kristianna Winther Poulsen, løgtingskvinna

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum

Evni: Eldraøkið – eftirmeting og markamót

Spurningar:

1. Hvørji tilmæli av eftirmetingini um eldraøkið frá 2021 eru framd í verki, og hvør er tíðarætlanin fyri at fremja restina av tilmælunum í verki?

2. Hvat ætlar landsstýriskvinnan at gera fyri at taka burtur markamótini millum kommunurnar og Almannaverkið?

3. Fer landsstýriskvinnan at taka stig til, at ábyrgdin av fólki eldri enn 67 ár við serligum tørvi, eitt nú við sálarsjúkum, verður savnað hjá landinum?

4. Fer landsstýriskvinnan at taka stig til, at alt demensøkið, eisini demensrakt yngri enn 67 ár, kemur undir kommunala ábyrgd?

Viðmerkingar:

Eldraøkið varð lagt frá landinum út til kommunurnar at umsita í 2015. Høvuðsendamálini við at leggja økið út til kommunurnar vóru at minka um frástøðuna millum myndugleikan og borgaran og fáa eitt greiðari ábyrgdarbýti.

Í sambandi við útleggingina varð ásett, at útleggingin skuldi endurskoðast eftir 5 ár. Í desember 2021 kom hendan eftirmetingin, sum fevnir um 15 tilmæli. Spurningurin er so, hvussu tað gongur at seta hesi tilmæli í verk.

Kommunurnar meta sum heild, at galdandi lóg um heimatænastu og eldrarøkt er nøktandi. Markamótini millum Almannaverkið og eldrarøktina eru sambært kommununum størstu trupulleikarnir við lógini.

Almannaverkið hevur ynski um, at øll higartil óavklárað viðurskifti verða neyvari regulerað í lóggávuni, og at ivi ikki stendst av, hvørt tað er landið ella kommunurnar, ið eiga ávísu uppgávuna, bæði viðvíkjandi sjálvari tænastuni og viðvíkjandi gjaldsskylduni.

At kunna veita góðar tænastur til okkara eldru er altavgerandi fyri teirra tilveru. Eldraøkið er harumframt fakliga krevjandi og kostnaðarmikið. Politiska skipanin má syrgja fyri, at formligu karmarnir eru góðir, til frama fyri trivnaðin hjá teimum

menniskjum, hvørs lívsgóðska er treytað av einum vælvirkandi eldraøki, og fyri at fáa væl skikkað starvsfólk at trívast á eldraøkinum.

Tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýriskvinnuni við ábyrgd av eldraøkinum.

Á Løgtingi, 20. september 2024

Kristianna Winther Poulsen